BÁTUR
í Vági til sølu.
Tlf. 263015

Bingo

BINGO
verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 30. mai kl. 19.00. Eykaspælið er nú 1.200 kr. Øll eru vælkomin.
H.S.R.

GOTT BINGO
verður leygardagin 28. mai kl. 20. Hetta er seinasta bingo áðrenn summarsteðgin. Øll vælkomin.
Tórshøll

BINGO
Rimmar 100 ára føðingardagsbingo verður í Vágs høll 1. juni kl. 19.
VB-Sumba, ungdómsdeildin

BINGO
Bingo verður í EB-húsinum mánakvøldið 30. mai kl. 19.30. Lutaseðlar verða seldir.
EB á Eiði

GOTT BINGO
Verður í B36-húsinum leygardagin 28. mai kl. 15. At vinna á lutaseðli m.a. Ferðaseðil frá Atlantic Airways.
B36

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba leygardagin 28. mai kl. 19.00. Minna eykaspælið endar. 5 kr. eykaspæl.
Nevndin

GOTT BINGO
Verður í Pálsstovu mánkvøldið 30. mai 2005 kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Til fulla plátu: Gávukort á 400 kr. Á lutaseðli: 15 vinningar, m.a. 2 uttanlandsferðir
Astma og Allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 26. mai kl. 19.00. 6. og 12. spæl gávukort á 600,- FK. Á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 500,- FK, flogferð frá Atlantsflog, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Argja Róðrarfelag

BINGO Í HVALBA
Týskvøldið 31. mai klokkan 19.30 verður gott bingo í Roynhøllini. Høvuðsvinningur er eitt gávukort á 1200 krónur frá FK.
Royn

KAGGIN
Gott bingo verður fríggjakvøldið 27 mai kl. 20. Nógvir góðir vinningar. 6. og 12. spæl gávukort á 1.000 kr. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 5 ísl. krov og 3 gávukort á 1.000,- Spælt verður eisini bingola, 20 kr. spæl o.a.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 30. mai kl 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eisini verða Gullbingo og Dannebrog spæld. Øll eru hjartaliga vælkomin
Glæman

Burturm. /funnið

SILVURARMBAND
funnið á Djúpagilsvegnum.
Tlf. 316469

HÚGVA FUNNIN
Stríput húgva funnin uttan fyri Idémøblar fríggjadagin í næstseinastu viku.
Tlf. 514114/314114

Býli í Føroyum

HEY
Vit eru eitt friðarligt par sum ynskja at leiga eina íbúð í Havn. Max. 3500 kr.
Tlf. 274532

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu tætt við Miðbýin í Havn. Atgongd til køk, bað, stovu og vaskimaskinu. 2000 kr. um mánðin + ljós og hita.
Tlf. 583071 Halltóra

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Hevur tú eina lítla íbúð at leiga mær? (Max. 3000 kr. um mánaðin) Eg eri 25 ár, havi fast arbeiði, gjaldi til tíðina og skikki mær pent.
Tlf. 583071 Halltóra

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 961
Stað: Tórshavn – eysturbýnum
Slag av veiðu: Sethús/tvíhús ella raðhús
Stødd: Uml. 150 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.150.000,-

Nr. 964
Stað: Hvalba – Tvøroyri
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: 3-4 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 400.000,-

Nr. 965
Stað: Tórshavn - Hoyvík - Argir
Slag av veiðu: Sethús við tveimum íbúðum
Stødd: Uml. 100 m² pr. íbúð
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.500.000,-

Nr. 966
Stað: Tórshavn (nær miðbýnum)
Slag av veiðu: Raðhús 2-3 hæddir
Stødd: Millum 70-150 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.500.000,-

Nr. 967
Stað: Á bygd – helst Sandoy
Slag av veiðu: Sethús – summarhús
Stødd: Ongar treytir
Ynskir: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Mesti kostnaður 120.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligur ungur maður søkir íbúð í Tórshavn. Eg fari væl um og gjaldi til tíðina. Um onkur hevur eina íbúð í Runavík/Saltangará er viðkomandi eisini vælkomin at ringja á.
tlf. 254365

TIL LEIGU
2 kømur til leigu í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu. Nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158/514765

KJALLARAÍBÚÐ
Kjallaraíbúð á uml. 70 fermetrar, á Argjum, til leigu.Kostnaður 5.000,- um mánaðin incl. olju. Har eru 3 kømur, stova/køkur og wc/bað. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2089

ÍBÚÐ YNSKIST
Lítil íbúð til tvey ynskist í Havn. Fara væl um og gjalda til tíðina. Roykja ikki.
Tlf. 504179

TIL LEIGU
er miðhæddin í einum húsum í Tórshavn, húsini liggja í Gundadali (kjallarin er útleigaður). Køkur, stova, 2 kømur, wc/bað. Prísur: 6.800,- + el, hiti íroknaður leiguna. Skriva til Sosialin box 76 110 Tórshavn
Bill.mrk. 2088

NÝGGJ ÍBÚÐ
90 fermetrar við øllum hentleikum til leigu til einlig fólk fyri 6000 kr. pr. mør. v/hita, men + el.
Tlf. 215606

HÚS Í ELDUVÍK
til sølu.
Tlf. 274047

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
Grundøki er 278 m2 til víddar við ástandandi sethúsum, ið eru 60 m2 og í tveimum hæddum. Kjallarin er partvís innrættaður. Verða seld um hóskandi boð fæst.
Tlf. 374096/267158/267811

SUMMARHÚS TIL SØLU
Tvær innrættaðar bingjur, uml. 42 fermetrar. Myndir av tí kunnu sígggjast á www.bingjur.webbyen.dk
Tlf. 255525 eftir kl. 16

HÚS TIL LEIGU
Hús við Skálafjørðin til leigu frá 1. juni, stova-køkur-bað+ 4 sovikømur.
Tlf. 313738/213736

HÚS Á TVØROYRI
ynskist til leigu. Vit leita eftir húsum á Tvøroyri at leiga frá uml. 1. juli 2005.
Tlf. 221502

ÍBÚÐ YNSKIST
Kvinna søkir íbúð í høvuðsstaðnum. Royki ikki og fari væl um.
Tlf. 504629

HÚS YNSKIST
til leigu á Skála ella Strondum. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 503373

EG ERI EIN UNG
friðarlig genta, ið søkir eina íbúð ella kamar í Havn.
Tlf. 253536

FRÍTÍÐ Í SANDVÍK
Stór góð hús til leigu í styttri tíðarskeið.
Tlf. 456192/227192

HÚS YNSKJAST
til keyps, helst í eysturbýnum.
Tlf. 312190/512190

GISTING Í VESTMANNA
Ból og biti. Kømur til leigu frá 1. juli til 15. aug. Atgongd til wc/bað, køk, vaskimaskinu, internet, televarpið o.a. Húsið er nýtt og liggur í hugnaligum umhvørvi.
Tlf. 764747 ella 424747

HÚS Í HESTI
til leigu í vikuskiftum ella longri tíðarskeið. Pláss er fyri 8 fólkum.
Tlf. 508878

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
Hús ella stór íbúð ynskist til leigu í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 219418/311731

ERT TÚ FRIÐALIGUR
og fer væl um, havi eg nøkur kømur til leigu til friðarligt fólk, við atgongd til køk og bað.
Tlf. 316916 ella 506489

GISTING Í HÚSAVÍK
Møguleiki er fyri at gista ì ungmannahùsinum Sòlarris:Húsið er vælegnað til størri og smærri bòlkar, liggur væl fyri við vølli og sandi móti sjónum. Allir hentleikar eru í húsinum. Nærri fæst at vita, við at ringja.
Tlf. 361371-224452 · Fax 361671

SKÁLAVÍK
Góð frítíðarhús, sum liggja væl fyri við góðum útsýni, verða leigað út í styttri tíðarskeið. Húsini hava allar neyðugar hentleikar. T-post: debes@post.olivant.fo heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
Tlf. 311197 ella 211192

Býli uttanlands

ÍBÚÐ Í RINGSTED
til leigu, kann møguliga seljast til leigara. Ìbúðin liggur í einum fyrrverandi landbrúksskúla í nattúruvakra Kærehave í Ringsted, beint við mark og skóg. Ìbúðin er 1 ára gomul, 85 kvm. ljós, og kostar 6000 kr. um mánaðin. Sera gott buss og toksamband, 15 min. til Roskilde um tú/tit lesa á RUC. 35 min. til Kbh. Hóskar seg sera væl til eina familju við einum barni ella t.d. tvey lesandi. Hevur hetta vakt tín áhuga, skriva til:
rasmussen-nielsen@hotmail.com

ÍBÚÐ TIL LEIGU Á AMAGER
2 v íbúð til leigu frá 11/7 til 12/8. Beint við Amagersentrið. 1200 kr. umvikuna. Ring til 32554283 (eftir kl. 18.00) el. skriva til
rannjoe@hotmail.com

ÍBÚÐ Á FREDERIKSBERG TIL LEIGU
Nýrenoverað 3 ver. íbúð á Frederiksberg til leigu 15. - 19. juli kr. 1.000,- og 27. juli til 8. aug. kr. 2.500,- ella kr. 300,- um dagin. Íbúðin liggur í barnavinarligum umhvørvi við stórum garði og spæliplássi; uml. 2 min. til Metro og Frederiksberg Centrið.
Tlf. (0045)46324478 ella (0045)21694740

SUMMARFRÍ Í KEYPMANNAHAVN?
Raðhús til leigu frá 27/6 til 10/7. Ìbúðin liggur 2 min. gongd frá Bellacenter metrostatión, í ógvuliga barnavinaligum umhvørvi. Ìbúðin hevur hava og allar hentleikar. Stødd 80 kvm. Prísur 4000 kr.
Ring aftaná kl. 18.00 à tlf. 32522354

FERIELEJLIGHED
i København udlejes i ugerne 28, 29, 30 og 31. Velholdt 2V ved Valbyparken. God off. transport, tæt på City. Pris 2.000,- pr uge (incl forbrug), billigere ved flere uger. Lene Gary +45 36443911.
lene.gary@webspeed.dk

SUMMAR Í KEYPMANNAHAVN
Lekkur nýumvæld 140 kvm, 3 verilsis íbúð við øllum hentleikum, fult møblerað, 2 wc. liggur mitt inni i centrum, beint við vøtnini å eysturbrugv. Verður útleiga frá 01.07-15.08. kostnaður 15.000 fyri alla perioduna.
Ring og hoyr nærri +4526289337

ÍBÚÐ Í KBH. TIL FRAMLEIGU
2-rúms íbúð til leigu frá 1.juni 2005. Prísur 5000 pr. mør.
Tlf. 0045 25126971 - Petur

ÍBÚÐ UTTANLANDS
Vit eru nakrir fittir menn, ið manga eitt stað at búgva í Keypmannahavn í viku 23 6. - 12. juni. (Skulu rógva í Ishøj).
Tlf. 210298

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH.
Vit eru 2 20 ára gamlar gentur, ið lesa. Vit ynskja 2-3 verilsis íbúð frá 1. august 2005 – 1 1/2 ár fram.
Tlf. 252016/267227/214687

SUMMARFRÍTÍÐ Í KHB.
1 1/2 rums íbúð á vest Amager til framleigu frá 25. mai til 8. august. Íbúðin hevur allar hentleikar og liggur 5 min. frá Fields, Metro og tok. Prísur pr. dag 250 kr. og pr. viku 1.500 kr.
Tlf. +45 26483231 eftir 22. mai 271717, Beinta

ÍBÚÐ YNSKIST
Søkt verður eftir íbúð til leigu í Keypmannahavn-økinum til ungt par, har maðurin akkurát er byrjaður á Politiskúlanum. Vit kunnu flyta inn beinanvegin.
Tlf. 25128150

Dýr

FØROYSKUR HESTUR TIL SØLU
Ein føroyskur 14 ára gamal hestur til sølu.
Tlf. 421269 ella 211269

AKVARIUM
Eitt 54 litr. akvarium við fiskum og øllum tilhoyri til sølu vegna flyting. Prísuppskot 1.500,- Ring og hoyr nærri á
tlf. 507929

FITTIR HUNDAHVØLPAR
Tveir sera fittir hundahvølpar kunnu fáast. Mamman er hálv labrador, ógvuliga spøk og góð við børn.
Tlf. 317694/504124

TIL SØLU
4 tarvskálvur bíliga til sølu. Aldur: frá 2 vikur til 5 mør.
Tlf. 218101, Velbastað

DUNNUUNGAR
Til sølu.
Tlf. 421421

KETTLINGAR
2 sera fittir kettlingar verða latnir djóravinum.
Ring á tlf. 314714 ella 221778

EG HAVI EIN PRAKTFULLAN
kettling, men noyðist av við hann. Tað er ein dama og hon er kritahvít. Er 10 vikur og dugir at eta og leppa og er reinlig, er tað nakar, sum vil eiga hana og vera góð við hana, so ring
tlf. 312191/267780

HUNDAHVØLPAR
4 hundahvølpar latast til djóravinir um einar 6 vikur. Hvølparnir eru óektaðir Golden Retriver.
Tlf. 441656

SERLIGAR UMSTØÐUR
gera, at hundur okkara verður latin til djóravin. Hundaslag: ektaður silvurgráur puddil. Hann verður 2 ára gamal í juni.
Tlf. 211001

UNDULÁTAR
Litríkir undulatar til sølu.
Tlf. 580472

SERA FITTUR KETTLINGUR
Ein sera fittur hvítur kettlingur, ca 10 vikur, dugur at leppa, eta og er reinligur, fæst við at avheinta.
Tlf. 447863

MARSVÍN TIL SØLU
Búður og matur fylgir við.
Tlf. 449152

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Ein svørt labrador/flatcoated retriever tík er til sølu vegna flyting. Hon er 15 mør gomul og sera vinarlig. Um tú ert djóravinur og hevur tíð til hund, og er hetta nakað fyri teg, ert tú vælkomin at ringja á
tlf. 594672 og 269446

UNDULÁTAR
Nakrir undulátar (ungar) til sølu.
Tlf. 262585 eftir kl. 16

ÍSLANDSROSS
Íslandsross verður selt til royndan reiðmann.
Tlf. 587204

PERSARA KETTLINGAR
Ektaðir persara kettlingar til sølu.
Tlf. 310476/510476

EIN EKTAÐUR
labrador hundur. Gott eitt ára gamal, er sera penur, til sølu vegna serligar umstøður.
Tlf. 273097

FRENSUR VERÐUR LATIN
1 ára gamal frensur verður latin til djóravin. Vit kunnu ikki hava vegna ovurviðkvæmi í familjuni. Hann er sera spakur og góður við børn.
Tlf. 226537

HEY!
Nú hevur Perla fingið hvølpar av góðum collie seyðahundaslag. Kunnu latast í juli.
Tlf. 422076

EKSTAÐUR PUDDILHUNDUR
Til sølu.
Tlf. 582040

EIN TAMUR DVØRGPAPAGEYKUR
Sera spakur + búður og umleið 1 ár við mati til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 270594

Fartelefonir

NOKIA 6610i
til sølu fyri 1.200,- Telefonin er 1 mør. gomul og kostaði 1595,- nýggj. Hevur kamera, FM-stereoradio ogmultimediebeskeder (MMS)
Tlf. 220898

NOKIA 3510i
fartelefon við MMS og litskíggja sera væl viðfarin, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 222393

TIL SØLU
1 ára gomul Nokia 3200 til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 257658

Fundir

AÐALFUNDURIN
hjá Havnar Fimleikafelag verður í høllinni á Stórheyggi hósdagin 26. mai 2005 kl. 19.00. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

Innbúgv

SJÓNVARPSBORÐ TIL SØLU
Eitt trý ára gamalt sjónvarpsborð (L136 x H81 x D43) til sølu. Er í góðum standi. Pláss er til sjónvarp, video, DVD spælara, stereoanlegg, einar 100 fløgur, videobond og DVD-skivur. Mynd kann sendast. Nýprísur 1700 kr. Til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 522292

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Philips el-orgul,
sovisofa,
sofaborð úr teak,
box madrassa,
skriviborð.
2 lenistólar,
centrifuga,
gasfløska + bluss,
frystiboks.
Tlf. 312780